


www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 11 - 2012

# Lagt hald á ognir hjá Chevron

Ein dómari í Argentina hevur gjørt av, at hald verður lagt á ognirnar, sum oljufelagið Chevron eigur har í landinum. Talan er um tvær milliardir dollarar. Rætturin tók avgerðina eftir kravi frá einum dómstóli í Ekvador, sum hevur álagt Chevron at gjalda 19 milliardir dollarar í endurgjaldi fyri dálking frá oljuvirkseminum, sum felagið hevur havt har. Chevron hevur sýtt fyri at rinda endurgjald og hevur til fánýtis roynt at fáa hægstarætt í USA at taka sær av málinum. Myndugleikarnir í Ekvador siga, at oljufelagið Texaco dálkaði umhvørvið illa, tá felagið rak oljuvinnu í Amazon-umráðnum í árunum frá 1964 til 1992. Texaco varð lagt saman við Chevron í 2001, og tí er endurgjaldskravið lagt ímóti tí felagnum.